# Carpark North koma aftur til Føroyar



**Eitt av størstu nøvnunum í donskum tónleiki í løtuni Carpark North koma til Føroyar. Hetta er fyrsta festivalnavnið, ið er alment í tónleikaárinum 2006**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í teldubrævið við nýggjársheilsan til Planet.fo skrivar sangarin Lau: "Vit gleða okkum longu til í summar, tá vit enn einaferð koma til Føroyar, har vit skulu vitja ein av tykkara festivalum."

Í heyst spældu Carpark North tvær sera væleydnaðar konsertir í Fuglafirði. Fyrra konsertin við bólkinum var fullkomiliga útseld, og salurin í Mentanarhúsinum kókaði. Tí varð skipað fyri eini eykakonsert. Henda gjørdist meira intim, einans 50 áhoyrarar vóru sunnukvøldið, og hetta dugdi bólkurin væl at brúka til at skapa ein annan nærleika.

Men nú fáa føroyingar høvi at hoyra bólkin aftur, enn er ikki greitt hvønn festival talan er um, men vit arbeiða við at kanna málið.

Í samrøðu við Sosialin aftan á konsertirnar í heyst søgdu limirnir í Carpark North, at teir vildu sleppa aftur til Føroyar, tí upplivingin hevur verið so jalig.

"Det var helt vildt fedt", segði sangarin Lau. Hann greiddi frá, at undan konsertina kendu teir í bólkinum so at siga onki til Føroyar, og høvdu teir tískil onga hóming av, hvussu teir fóru at blíva móttiknir av føroyingum. Men teir vórðu ovfarnir av teimum lívligu áhoyrarunum, sum veruliga góvu teimum eitt minnið fyri lívið.

Nú fáa teir hetta høvið.

## Afenginn ynskir føroyingum gott nýggjár



Gott nýggjár til lundarnar, hvalirnar og kóparnar, Kristian, Sharon, Hergeir og G!. Øll undurfull fólk millum Hattarvík og Mykines, Trøllanes og Akraberg. Eitt avslappað og íblástursfylt gott nýggjár, ynskir øll tann bastard-etniska familjan úr Retrograd, Afenginn.

Afenginn vitjaðu Føroyar í summar og millum nógv deilig og minnilig minnir, kunnu vit nevna túrin við báti til Fugloynna (við kinakassum og aldum, ein synkopastisk mongd av vøkrum, blíðum og undurfullum fólki, skerpikjøt, grind við brombersós, seyð, The Final Countdown, seyð, bjór, hinu ferð vit sóu ein seyð o.m.a.

**Afenginn**

## Gleðiligt nýtt ár ynskja Hjálmar

Góðu føroyinga takk fyri frálíka móttøku á G! í summar, vónandi síggjast vit aftur næstu ferð.

Tað var veruliga stuttligt at vitja tykkum góðu vinir. Vónandi verður komandi ár eydnuberandi og gleðiligt fyri tykkum øll.

**Hjálmar**

# Íslendski Lansbankin ætlar sær eisini til Føroya

**Fyrst kom Kaupthing við sínari ætlan í Føroyum. Nú letur til, at íslendski landsbankin ikki ætlar at lata hetta fara aftur við borðinum, og arbeiðir tí við somu ætlanum**

PENINGASTOVNAR
*Snorri Brend*




*Landsbanki Íslands ætlar sær nú at víðka um virksemið við at lata upp deild í Føroyum*

Tað hevur leingi ligið í luftini, at íslendskir peningastovnar ætlaðu at vinna sær fótafestið á føroyskari jørð.

Hin sonevndi Íslandssáttmálin gav grundarlag fyri hesum. Hóast hesin enn ikki er komin heilt í gildi enn, so sæst longu fyrsti gróðurin av hesum.

Í farna mánaði kom fram, at íslendski bankin Kaupthing ætlaði at byrja við virksemi í Føroyum.

Og honum á baki hevur nú Landsbanki Íslands lagt ætlanir um tað sama.

Enn eru øll viðurskifti ikki greið hesum viðvíkjandi, og heldur ikki er nøkur tíðarætlan løgd.

Men gongst sum ætlað fer Landsbanki Íslands at lata upp deild í Føroyum í næstum.

### Tekur tíð

Enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvat slag av virksemi, sum íslendski Landsbankin ætlar sær undir í Føroyum.

Sum skilst so ætlar Kaupthing sær at satsa uppá vinnulívið í Føroyum

Í fyrsta umfari er ætlanin ikki at Kaupthing skal veita privatum kundum lán, og ætlanir eru heldur ikki um at stovna deildir kring landið. Kaupthing bankin í Føroyum verður at meta ein deild hjá Kaupthing Banka í Íslandi, og sum hevur deildir í 10 londum.

Tí er ikki óhugsandi, at Landsbankin ætlar tað sama. Men um teir fara undir veruligt bankavirksemi, við t.d. eini bankadeild fæst eingin at siga nakað um í løtuni.

Hinvegin skilst, at bankin hevur fingið fatur á einum umboðsmanni í Føroyum. Hesin umboðsmaðurin er nú í ferð við at leggja lunnar undir virksemið hjá hesum íslendska stórbankanum her á landi.

Enn er heldur ikki greitt, hvar Landsbankin fer at lata upp deild í Føroyum. Mest hugsandi er tó, at hetta verður í Havn.

Sosialurin hevur verið í samband við viðkomandi umboðsmann, men hann sigur seg onga viðmerking hava í løtuni.

Málið tekur ta tíð, sum krevst, er stutta viðmerking hansara.

Vit ætlaðu eisini at fáa orðið á ein av stjórunum í Landsbanka Íslands, men hetta eydnaðist ikki í dag, av teirri einfaldu orsøk av bankin var stongdur.